gult cyan magenta svart



VIÐMERKINGAR

# Beata, um tú ikki veitst, so kann eg siga tær



**Elin Lindenskov**
*býráðslimur*

Í samrøðu við Útvarpið mikukvøldið sigur tú, sum nývald forkvinna í Sosialu nevnd, at tú ikki veitst, hvussu vit kunna loysa trupulleikan við tørvandi barnaansingini í Kommununi. Eg hvakk við, tá ið eg hoyrdi teg siga hetta, tí frammanundan valinum vistu bæði tú og hini valevnini í Sambandsflokkinum væl, hvussu hesin stóri trupulleikin skuldi loysast. Sjálv hevði tú eisini eina grein, har tú sigur, at ikki fyrr enn Sambandsflokkurin hevur leiðsluna, kann Tórshavnar Kommuna gerast ein mynsturkommuna burturav. So má eg spyrja, hvussu kann ein kommuna gerast mynsturkommuna burturav, tá ið sjálv forkvinnan í sosialu nevnd, ikki veit, hvussu ein tann størsti trupulleikin, sum kommunan hevur, skal loysast?

Tá ið tú nú ikki veitst, hvussu barnagarðstørvurin skal loysast, so kunnu vit bert fegnast um, at tað býráðið, sum sat frammanundan tær, hevur gjørt alt fyrireikingararbeiðið, sum skal til fyri at loysa trupulleikan. Í so máta ert tú komin til skorin klæði, ver tú glað fyri tað.

Í inniverðandi fíggjarári eru settar 81 mill. kr. av til barnaansingarøkið, ein øking í mun til 46. mill. kr, sum vóru avsettar í 2000. Hetta svarar til eina øking uppá 200 børn, sum fáa tilboð um barnaansingarpláss í ár. Fyrsti stovnurin í árinum er longu farin at taka børn inn, tað er útibarnagarðurin, sum húsast í skótahúsinum hjá S.S.B. skótunum.

Barnagarðurin í Vesturbýnum er undir bygging og verður liðugur í summar, har sleppa 60 børn inn, umframt at ein stova verður til børn við serligum tørvi.

Afturat hesum plássunum er peningur settur av til 120 onnur pláss. Um tú hevði gjørt tær tann ómak at kanna eftir, hvørjar ætlanir eru lagdar, so hevði tú eisini vitað, at fráfarna býráð hevur gjørt eina ætlan, ið inniber, at vit í Tórshavnar Kommunu skulu hava 100% barnaansing áðrenn 2003.

Nú kann tað vera, at nýggja leiðslan í Tórshavnar Kommunu ikki hevur í huga at fylgja ætlanunum hjá fráfarna býráðnum. Um so er haldi eg, at tit áttu at komið fram við tykkara ætlannum.

Tá ið tú nú ikki veitst, hvussu barnaansingartrupulleikin skal loysast, so kann eg geva tær eini ráð: Fylg ætlanini sum fráfarna býráð setti sær fyri, byrja við at seta pening av at byggja vøggustovur fyri.

Barnagarðstørvurin er um at verða loystur, nú eiga tey smæstu børnini at verða raðfest ovast!

# Che Guevara-syndromið



**Heri Mohr**

Út er komin bókin »Che-Images of a Revolutionary«, sum hevur fingið ummæli av Klaus Wivel í Weekendavisen 12.-18. januar 2001.

Ummælarin sigur m.a., at í 70-unum hekk tað kenda bílætið av Che í kamarinum hjá at kalla hvørjari teenage-gentu, og hann vil vera við, at tað enn í okkara døgum er at síggja á bannarum og t-shirts hjá vinstrahallum eitt nú REBEL í Danmark, ETA í Baskarlandinum og hjá Zapatistunum í Mexico. Hann, Klaus Wivel, veit kanska ikki av, at bílætið av Che Guevara fyri stuttari tíð síðan hevur fingið pláss á vegginum í landsstýrisins mentamálastýri og at hann sostatt er vorðin mentanarmaskottur landsstýrisins.

Í bókaummælinum verður m.a. framhildið, at »han var en skandaløs dårlig politiker, der til trods for, at han ikke havde en havana-cigars forstand på økonomi, først blev udnævnt til Cubas nationalbankdirektør, dernæst til industriminister hvorefter han i løbet af ganske få år kørte Cubas økonomi i sænk og stødte både USA og Sovjet fra sig«. Um hann, áðrenn tað var komið so langt, eisini hevði roynt seg sum mentanarmálaráðharra, sigur ummælarin onki um.

»Han medvirkede til henrettelse på op mod 1500 politiske afvigere, kort efter at Castros vejr var i hus, så nogen stor nådebetynget humanist var han heller ikke…«

Í 1965 var Castro »træt af drømmerens politiske katastrofer«. Che Guevara segði tí sín cubanska borgarrætt frá sær og fór »under falsk identitet« fyrst til Congo, og haðani flýddi hann til Tanzania, áðrenn hann fór til Bolivia, har hann varð myrdur í 1967 – 39 ára gamal.

# Viðv. málinum um undantaksloyvi til »Tjaldrið«

*Tíðindaskriv*

Útvarpið endurgevur á middegi í dag manningarfeløgini fyri at siga, at Sjóvinnufyrisitingin er farin útum sínar heimildir við at geva »Tjaldrinum« eitt undantaksloyvi til at sigla við einum manni minni enn ásett er fyri skipið. Eisini verður sett spurnartekin um gegnið hjá fyrisitingini at kunna áseta eina manning á skipini hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni. Víst verður á, at Sjóvinnufyrisitingin hoyrir til sama stýri sum Vaktar- og Bjargingartænastan.

Sjóvinnufyrisitingin kann upplýsa, at tá ið manning verður sett á eitt skip, verður gingið eftir løgtingslóg um manning á skipum. Í hesari lóg er tað staðfest, at tað er Sjóvinnufyrisitingin, sum umsitur hesa uppgávu.

Eisini er ásett í hesari lóg, at bæði reiðari og sjómannafeløg kunnu kæra eina avgerð um manningarásetan til Sjóvinnuráðið, sum so kann taka eina endaliga avgerð í slíkum máli. Í Sjóvinnuráðnum sita umboð fyri bæði reiðarafeløgini og sjómannafeløgini. Formaðurin í ráðnum er sorinskrivarin.

Sjómannafeløgini hava eisini brúkt hendan rættin og fingið økt manningartalið.

Tá ein avgerð er tikin í Sjóvinnuráðnum, verða manningarskjølini rættaði samsvarandi avgerð ráðsins.

Á sama hátt sum feløgini hava rætt til at kæra eina manningarásetan, kunnu tey eisini kæra eitt undantaksloyvi.

Sjómannafeløgini leggur nú Sjóvinnufyrisitingina undir at fara út um sínar heimildir og at leggja seg út í lønarstríðið við Fíggjarmálastýrið við at geva undantaksloyvi til »Tjaldrið« at sigla við einum persóni færri enn ásett er í manningarskjalinum.

Sjóvinnufyrisitingin undrast á eina slíka útsøgn frá feløgunum og at feløgini nú seta spurnartekin við hetta undantaksloyvi. Skipið hevur áður havt hetta loyvið, uttan at feløgini tá mótmæltu hesum. Í februar 1995 søkti Vaktar- og Bjargingartænastan um at fáa loyvi til í undantaksføri og í avmarkaðari tíð á døgninum, um at kunna sigla við skipinum, uttan at hava fulla manning umborð.

Serliga varð víst á møguleikan um at kunna flyta skipið millum havnir, uttan at øll manningin var umborð.

Sjóvinnufyrisitingin gav tá eitt undantaksloyvi, sum var tíðaravmarkað. Tað, sum Sjóvinnufyrisitingin nú hevur gjørt er, at forleingja hetta loyvi. Hetta loyvi, sum kann brúkast í undantaksføri og í einum tíðarskeiði, sum ikki má fara útum 12 tímar í einum samdøgurið, setur ikki til viks avgerðina um, hvussu nógvir persónar skulu vera knýttir at skipinum. Sostatt er avgerð okkara ikki knýtt at nøkrum stríði um lønarviðurskifti.

Viðv. spurninginum um gegni, kann verða víst á §§2 og 4 í løgtingslóg um manning á skipum, nr. 63 frá 3. juli 1998, har tað er staðfest, at tað er Sjóvinnufyrisitingin, sum kann seta manning á føroysk skip.

Sjóvinnufyrisitingin er, sambært lógini, fyrisitingarliga skipað undir landsstýrismanninum í sjóvinnumálum.

# Partabrøv í Føroya Fiskavirking

**Jens Kári Vilhelm, stjóri**
**Wilhelm Petersen, nevndarformaður**
*Tíðindaskriv*

Nevndin fyri Framtaksgrunn Føroya hevur avgjørt at fara undir at selja partabrøv í Føroya Fiskavirking.

Eftir at Føroya Fiskavirking seinastu 3 árini hevur verið í støðugari menning við nøktandi rakstrarúrsliti, verður mett, at tíðin er búgvin at fara undir eitt fyrsta stig at selja partabrøv I felagnum.

Nevndin í Føroya Fiskavirking hevur fingið boð um at fara undir at fyrireika hetta fyrsta umfar, har miðað verður ímóti at selja umleið 10% av partapenginum, sum hevur eitt áljóðandi virði uppá kr. 60,0 mió.

Sum ein liður í fyrireikingunum av at selja nøkur av partabrøvunum í Føroya Fiskavirking, verður gjørt eitt upplýsingarrit, eitt sokallað prospekt, um Føroya Fiskavirking og tess virksemi og verður tilevnað eftir teimum reglum og krøvum, sum eru galdandi fyri, at eitt virki kann verða skrásett á einum virðisbrævamarknaði.

Verður sølan av teimum fyrstu partabrøvunum nøktandi, verður fari undir at selja fleiri, ikki bert í Føroya Fiskavirking, men eisini í øðrum feløgum, tá mett verður, at hesi hava nøktandi rakstrarúrslit at vísa á.

Um ikki so langa tíð er væntandi, at P/F Virðisbrævamarknaður Føroya fer undir sítt virksemi og verður hesin virðisbrævamarknaður eitt týdningarmikið amboð hjá Framtaksgrunni Føroya at selja burturav partabrævaognum sínum, til dømis í Føroya Fiskavirking.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm er kunnaður um avgerð Grunnsins.

# hygg & hoyr



Frá fríggjadegi 19. januar til hósdagin 25. januar

## Barrin




*TV3 fer mánadagin undir eina nýggja sending, nevnd Barrin. Í Barrini skulu 14 vanligir danir dystast um vinningin, sum er 500.000 krónur. Í hesi sendingini eru tað hyggjararnir, sum hava ávirkan á gongdina og atkvøða luttakararnar út so hvørt.*

*Í sendingini skulu 14 danir reka eina barr í Keypmannahavn í tríggjar mánaðir. Teirra uppgáva er, at fáa barrina at bera seg og liva av hesum inntøkunum. Luttakararnir búgva saman í eini íbúð, tá tey ikki eru til arbeiðis í barrini. 24 upptøkutól eru sett upp í barrini og í íbúðini, sum allatíðina vísa, hvat tey takast við. Einasta staðið uttan upptøkutól er vesið.*

## Pokémon

*Annika Sølvará, ummælir:*



Tað er nýliga gingið upp fyri mær, at tað er nakað, sum eitur Pokémon. Dótturin er ikki nóg gomul enn til at verða fangað av lýsingunum og av prátinum hjá vinfólkunum, men kortini er hon so smátt farin at tosa um Pokémon, Pikachu og Ash. Hvørgin okkara er serliga innaliga í, hvørjir hesir figurar eru. Tí helt eg innslagið í Krás sunnukvøldið verða so stuttligt. Her lýstu nøkur børn, hvat tey hildu um Pokémon og hvussu tey spældu við kort, teldur, sóu filmar osf. Ein mamma segði sína hugsan, og kom eftir mínum tykki við nøkrum sera beinraknum og hugvekjandi tankum um børn og spæl. Hon minti á, at tað ber ikki til at leggja ábyrgdina á spølini, um børnini ikki tola tey, tað eru foreldrini, sum mugu seta mørkini fyri sínum børnum. Tað er heldur ikki nýtt, at børn eru púra bergtikin av einum ávísum spæli. Hvør minnist ikki Barbie, Ninja Turtles, He-men? Longri aftur minnist eg eisini cowboyarar og indianarar, sum bardust í Klaksvík við veruligum bogum og pílum og brendu smátturnar hjá hvør øðrum. Harðskapurin var ikki minni tá enn nú, kanska heldur øvugt. Eitt annað hon tók fram var tað positiva við at børn læra at nýta teldu gjøgnum spæl. Sendingin var ein sera góður kontrastur til Tilveru fyrr í vikuni, har søgan aftanfyri Pokémon lýst. Hvørjir figurarnir eru og hvussu maðurin aftanfyri var komin á at skapa hendan heimin av undarligum verðum. Annars varð Pokémon mest viðgjørt sum ein álvarsligur trupulleiki, sum kann hótta lív og heilsu hjá børnum. Báðar sendingarnar vóru góðar, men í Krás fekk eg meira at vita um Pokémon, sum eg kann brúka til at meta um, í hvønn mun vit eisini skulu spæla við.

**Minnir úr gomlum døgum**

Oyrað fangar altíð betur tað, sum tað kennir til frammanundan. Tað var stuttligt at hoyra skyldmannin Jóhan Hendrik Winther Poulsen greiða frá um familjuna í Skopun. Hevði tað ikki verið prátað um fólk, sum eg kendi ella havi hoyrt um, hevði áhugin helst ikki verið so stórur, tí eg eri eitt sindur troytt av hesum slagi av sendingum. Jóhan Hendrik er nú so góður frásøgumaður og orðkringur, so kanska eg hevði lurtað kortini. Ein annar góður søgumaður var í SVF sunnukvøldið. John Nybo ella í Liðanum, sum hann kallaði seg, greiddi frá um seg sjálvan, barndómin í Føroyum og lívið sum blindur í Danmark. Hann tosaði eisini um vinmannin Kristian á Brekkumørk, sum hevði fylt 100 fyri jól. Søgurnar har hann samanbar lívið í Múla við Viðareiði lýstu klárt, hvussu ymiskt fólk hava livað í Føroyum. Tað sæst millum bygdirnar, men tær kundu tað sama havt ligið í hvør sínum verðinsparti. Myndirnar úr hoyna í summar vóru hugaligar, men snýttu eitt sindur. Ongin býr longur í bygdini, so nú er bara kalt í Múla. John Nybo, sum búði í Danmark frá 1947 til hann doyði í heyst, tosaði Viðareiðismál sum fáur. Kanska er tað tí, at hansara føroyska ikki varð so nógv ávirkað av øðrum dialektum, øll árini hann búði niðri. Sum alla aðra staðni í heiminum eru dialektirnar spakuliga við at hvørva, og eitt »ríkismál« vinnur fram. Sum hann tók til: »Dialektirnar ma'ast burtur«.

Søgan um hugsanina hjá viðoyingum um Christian Matras, sum: »rakst niðri í Danmark og las« sigur nakað um ta hugburðsbroyting, sum er farin fram seinastu øldina. Fyrr varð tað hildið verða skomm, ikki at hava hug at arbeiða við hondunum, at brúka tíðina inni við nøsini niðri í bókum. Nú vit júst hava hátíðarhildið 100 ára føðingardagin hjá Kristiani er tað beint øvugt. Tey sum ikki hava eina bókliga útbúgving eru lægst lønt, og hava verri og verri við at klára seg í nútímans samfelagnum. Undantikið fiskimenninir skilst, har er miðallønin avgjørt ikki í lægra endanum, fyri ikki at tosa um tað, sum er eftir aftaná skatt.

Sjálvur mátti John Nybo sleppa ætlanini um at taka eina útbúgving, tá hann bleiv blindur. Hann lærdi í staðin til bustabindara, og arbeiddi í nógv ár í hesum yrki. Hann meinti sjálvur, at hann var einasti blindi, sum var limur í einum fakfelag í Danmark. Gott, at vit sluppu at hoyra John Nybo siga frá sínum lívi, tí slíkur lívsvilji og hugburður er sera eggjandi at hoyra um.

**Málið ber sendingina**

Viðhvørt hefti eg meg serliga nógv við málið í sendingunum. Ofta bera innsløgini í tíðindunum brá av at verða skrivaði í skundi. Merkiligir setningar fáa sjálvt innihaldið at fána burtur í bakgrundina, meðan eg hugsi um, hvat ætlanin veruliga var at siga. Eitt dømi, har eg púra misti tráin, var ein morgunin Bjørgfinnur Nielsen las eina søgu í barnaløtuni, sum eg ikki haldi var serliga væl eydnað. Knortlut skriftmál riggar ikki til upplestur klokkan eitt korter til átta. Eg kann ikki so frægt sum koma til hugs, hvat søgan snúði seg um. Gunnar Nolsøe trívist væl við mikrofonina, hann hevur ikki gloymt kynstrið frá tíðini, hann var plátuvendari. Tað er altíð hugaligt at hoyra sendingarnar hjá honum, tí hann vandar sær um orðini, er lættur uttan at verða alt ov smartur. Ein av bestu orðingunum er: »trífalt tvífalt v« fyri WWW. Tað ljóðar sum ein gandasetningur, hokus, pokus, filiokus.

## Bestubitar: Søga og spír 1:6




## Basalt




## Freefall

